# LEGGUR FRÁ LANDI MITT Í KREPPUNI

JÚST SUM KREPPA Í HEIMSBÚSKAPINUM NOYÐIR STÓR REIÐARÍ AT LEGGJA SKIP ELLA AT FÁA BÍLIGARI MANNINGAR UMBORÐ, FER HEIMSINS **STØRSTA** OG **DÝRASTA FERÐAMANNASKIP** Á SÍNA FYRSTU FERÐ UM EITT AV HEIMSHØVUNUM.



**SKIPASMÍÐ**
**Árni Joensen:**
arni@sosialurin.fo

Danir og onnur, sum fara við bili yvir um Stórabelti um vikuskiftið, fara uttan iva at seta ferðina niður, um tey eru so heppin at vera har, tá heimsins størsta ferðamannaskip fer undir brúnna sunnaneftir. Fleiri teirra fara ivaleyst eisini at hveppa seg við, tá skipið nærkast brúnni, tí tað verður stutt ímillum brúnna og tað ovasta á






MYNDIR: RCC

skipinum. Ja, í veruleikanum hevur skipasmiðjan bíðað við at seta ta seinastu útgerðina upp, tí anars hevði skipið borið við brúnna um Stórabelti. Harafturat verða skorsteinarnir lækkaðir eitt sindur, tá skipið fer undir brúnna.

Oasis of the Seas, sum skipið eitur, er heldur ikki nakað vanligt skip. Tað er ikki bara heimsins størsta ferðamannaskip, tí í veruleikanum er tað næstan helvtina størri enn tað næststørsta. Úr kúlustevninum og aftur á hekkuna er skipið 360 metrar langt ella meiri enn tvær ferðir longri enn Norrøna og næstan tríggjar ferðir longri enn Smyril. Umborð eru 2.700 kømur, og tá hvørt kamar er ætlað tveimum fólkum, hevur skipið pláss fyri 5.400 ferðafólkum. Manningartalið er minst 2.200, so tilsamans eru umleið 7.600 fólk við Oasis of the Seas, tá skipið er fullmannað.

Tey, sum hava vitjað umborð á Oasis of the Seas, eru sera hugtikin, men tað eiga tey kanska eisini at vera, tá havt verður í huga, at skipið kostar einar níggju milliardir krónur.

### Tað villasta

– Skipið er nakað av tí villasta, sum er gjørt higartil, segði sølustjórin hjá Royal Caribbean, Henrik Bergkvist, tá tíðindafólk vóru umborð á skipinum fyri stuttum. Tað man heldur ikki vera lang tav leið. Á teimum 18 dekkunum er at kalla alt, sum ferðafólk kunnu hugsa sær og helst eitt sindur meiri enn tað. Á einum dekki er ein baðistrond, eina aðrastaðni er eftirgjørt brim, so tað ber til at surfa, og uppaftur aðrastaðni eru ítróttarvallir – í fullari støddi sjálvandi. Svimjihyljarnir eru fýra, bløðrubaðini tíggju, og á einum dekki er eitt sokallað vatnland til alt húskið.

Eitt so dýrt skip gevur sjálvandi ferðafólkinum nógvar møguleikar at brúka nøkur oyru á ferðini. Matstovur, kaffistovur og barrir tróta ikki, handlarnir eru fleiri á fleiri dekkum, biohallir eru eisini, og tann, sum hevur áhuga fyri list, kann fara á listaframsýning á dekki átta. Á hesum dekkinum er eisini ein Central Park, har fólk kunnu sita og hugna sær á grasvøllinum undir 25 ymsum trøum og 1.200 plantum av ymsum sløgum.

Hóast støddina hevur tað ikki tikið meiri enn tvey ár at smíða skipið. Kjølurin varð lagdur tann 1. november í 2007, og skipið fór av bakkastokki í fjør. Tíðliga í heyst var tað royndartúr, og síðani hava fólk hjá finsku skipasmiðjuni STX Europe riggað skipið til ta fyrstu ferðina vestur til Florida. Tann 5. desember fer Oasis of the Seas á sína fyrstu cruise-ferð úr Port Everglades. Vit kunnu leggja afturat, at hvør einasta koyggja er bíløgd.

Norski skiparin á Oasis of the Seas, Tor Olsen, væntar ikki, at hansara skip fær kapping fyribils. Tí eingin fer at byggja so dýrt skip í krepputíðum, heldur hann.

### FAKTA **OASIS OF THE SEAS**

Bygt í Åbo í Finnlandi
**Longd:** 360 m
**Bruttotons:** 220.000
**Dekk:** 18
**Maskinorka:** 140.000 HK
**Mesta ferð:** 22 míl
**Kømur:** 2.700
**Ferðafólk:** 5.400
**Manningartal:** 2.200
**Byggikostnaður:** uml. 9 mia. kr.